

www.oljan.fo

**Jan Müller** 07 - 07 - 2013

# Faroe Petroleum borar í oktober

Oljufelagið Faroe Petroleum fær úr at gera restina av hesum árinum, nú tað hevur sett sær fyri at bora fleiri nýggjar leitibrunnar. Felagið boðar nú frá, at tað fer at seta borin í á Novus-leiðini á norska landgrunninum í oktober. Tað verður ein gamal kenningur frá boring á føroyska landgrunninum, sum fer undir hesa spennandi uppgávuna, nevniliga West Navigator. Tá skipið boraði fyri BP í Føroyum at tað West Navion. Novus-leitimiðið liggur í loyvi 645, sunnan fyri stóru Heidrun kelduna. Boringin fer eftir ætlan at vara í tríggjar mánaðir. Faroe Petroleum er fyristøðufelag við 50%. Hini feløgini eru Centrica við 40% og Skagen44 við 10%.